UTTAN ÚR HEIMI

# Aftur ein fangagøla í Irak

**Amerikanskir hermenn skutu mánadagin fýra fangar í einum fongsli har suðuri í Irak. Tilburðurin kemur USA illa við**

IRAK

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Teir seinastu dagarnar hava tey iraksku bløðini gjørt nógv burtur úr valinum seinasta sunnudag, men nú eru bløðini farin at skriva um ein tilburð í fangaleguni Bucca har suðuri í landinum.

Tá skutu amerikanskir hermenn fýra irakar, sum vóru í fangaleguni. Amerikanararnir siga, at nakrir av fangunum gjørdu uppreistur, og tá tey ikki eydnaðist at fáa teir at sissa seg, tóku hermenninir vápnini og skutu fýra teirra.

Iraksku myndugleikarnir er alt annað enn fegnir um tilburðin, og ráðharin í mannarættindamálum, Bakhtiar Amin, segði í gjár, at málið skal kannast til botns. Hann legði afturat, at kunnu amerikanararnir ikki prógva, at tað var neyðugt at skjóta við skørpum, fer stjórnin í Bagdad at krevja, at hermenninir, sum skutu, koma fyri rættin.

Ein talsmaður hjá amerikonsku herleiðsluni í Bagdad viðgekk, at herleiðslan hevur ikki fingið prógv fyri, at tað var neyðugt at skjóta eftir fangunum. Hann legði afturat, at tilburðurin verður kannaður.

Umleið 5.000 irakar eru fangar í leguni í Bucca, og fleiri teirra hava verið har í meiri enn eitt ár, uttan at ákæra er reist ímóti teimum. Tað hevur fleiri ferðir ljóðað, at fangarnir verða illa viðfarnir. Eitt nú segði bretska blaðið The Independent seg hava fingið at vita frá bretskum hermonnum, at amrikanararnir høvdu skotið ein fanga, sum sat í einum búri í Bucca-leguni.

# Funnin deyður



*Forsætisráðharrin í Georgia, Zurab Zhvania, varð gjáramorgunin funnin deyður í einari íbúð hjá einum vinmanni í høvuðsstaðnum Tblisi. Sambært innanríkisráðnum var hann deyður av gasseitran. Í gjár var ikki greit, um taslan var um eit óhapp, ella um hann var vorðin myrdur*
*Mynd: Reuters*

# Risastórt ísfjall loysnar

**Tann veksandi hitin á Jørðini hevur nógv størri ávirkan á Antarktis, enn vísindafólk higartil hava hildið**

UMHVØRVI

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Vísindafólk, sum kanna avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum, hava higartil hildið, at broytingarnar hava nógv størri ávirkan á leiðirnar við Norðpólin enn Antaktis, men nú vísa bretskar kanningar, at tað er ikki so.

Kanningarnar hava avdúkað, at eitt risastórt ísfjall er í ferð við at loysna frá har vesturi í Antarktis, skrivar The Independent. Grankararnir siga, at loysnar ísfjallið, kann tað hava við sær, at vatnsstøðan í heimshøvunum kann hækka meiri enn fimm metrar.

Ísurin oman á Antarktis er umleið ein kilometur til tjúkdar, og granskarar hava hildið, at hann broytist lítið og einki, sjálvt um einir 250 rúmkilometrar fara í havið á hvørjum ári. Men nú eru granskararnir farnir at ivast í, um ísurin har vesturi á Antarktis megnar at standa ímóti tí veksandi hitanum á Jørðini. Higartil hava teir hildið, at ísurin har kann loysna um eini hundrað ár, men nú siga teir, at tað kann henda fyrr enn so, og at tað kan fáa umfatandi avleiðingar.

## Bush ávarar Sýrialand og Iran

Stjórnirnar í Sýrialandi og Iran fingu eina beinleiðis ávaring, tá George W. Bush, forseti, helt sína árligu State of the Union-røðu í Kongressini fyrrakvøldið.

Um Sýrialand segði forsetin, at landið hýsir framvegis yvirgangsmonnum, og hann ávaraði stjórnina í Damaskus við at siga, at USA roknar við, at hon gevst við at stuðla yvirgangsmenn, og at hon heldur letur dyrnar upp fyri demokratiskum viðurskiftum.

Prestastýrið í Iran fekk eisini eina ávaring. Bush segði, at Iran er tað landið, sum fremst av øllum stuðlar altjóða yvirgangi. Hann legði samstundis Iran undir at hava ætlanir um at útvega sær kjarnorkuvápn, sjálvt um iranska leiðslan ferð eftir ferð hevur víst hesum aftur. Bush segði kortini, at USA og tess sameindu í Evropa fara at royna samráðingarleiðina fyri á tann hátt at fáa iranar at sleppa sínum kjarnorkuætlanum.

Sambært Reuter eru eygleiðarar á einum máli um, at ávaringin frá forsetanum er eitt tekin um, at USA er til reiðar at herða trýstið á leiðsluna í Iran. Herfyri segði Dick Cheney, varaforseti, at Iran er ein av teimum størstu trupulleikunum, sum heimurin hevur at stríðast við. Tann virdi amerikanski tíðindamaðurin Seymour Herch skrivaði fyri stuttum, at servandir amrikanskir hermenn hava longu verið í Iran og leitað eftir møguligum álopsmálum.

Enn er kortini einki, sum bendir á, at iranar eru hugaðir at slaka fyri trýstinum úr Washington. Leiðarin fyri iransku kjarnorkuverkætlanini segði mánadagin, at arbeiðið verður ikki steðgað, sama hvat amerikanararnir siga. Eins og tann politiska leiðslan helt hann fast um, at Iran ætlar bara at nýta kjarnorkuna til friðarlig endamál.

## Sigoynarar fáa betri umstøður

Átta lond í Eysturevropa eru saman við Heimsbankanum vorðin samd um at bøta um viðurskiftini hjá teimum eysturevropeisku sigoynarunum.

Á einum fundi í bulgarska høvuðsstaðnum Sofia skrivaðu forsætisráðharrarnir úr Bulgaria, Rumenia, Ungarn, Kekkia, Slovakia, Makedonia, Kroatia og Serbia-Montenegro undir ein sáttmála, sum ber í sær, at sigoynararnir skulu hava somu rættindi til skúlaverkið, heilsuverkið og bústað sum hin parturin av fólkinum. Stjórnarleiðararnir ásannaðu, at verandi lógir og reglur eru við til at seta sigoynararnar til viks, og umstøður teirra kunnu ikki góðtakast.

Umleið níggju milliónir sigoynarar eru í Evropa, og teir flestu búgva í teimum átta eysturevropeisku londunum. Nú fleiri av hesum londunum eru komin upp í ES, hevur samveldið kravt, at sigoynararnir fáa somu rættindi sum hinir borgararnir.

## Fleiri giftast á flogvøllinum

Altsamt fleiri ung svensk pør velja at giftast á Arlanda-flogvøllinum í Stockhólmi.

Í fjør vórðu 348 pør vígd á flogvøllinum ella meiri enn seks í meðal um vikuna, og árið fyri var talið 261 ella fimm um vikuna. Talsmaðurin hjá Arlanda-flogvøllinum sigur við tíðindastovuna TT, at tað eru serliga pør, sum skulu uttanlands á brúdleypsferð, sum velja at lata prestin víga tey á flogvøllinum. Tey, sum velja kirkjuliga vígslu, verða vígd í kapellinum á flogvøllinum, meðan eitt serligt móttøkurúm verður brúkt til borgarligar vígslur.

Sambært talsmanninum fáa tey nýgiftu hjúnini sera góða tænastu. Ja, tey fáa somu tænastu, sum kongshjúnini fáa, tá tey skulu út at ferðast, sigur hann.